Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 19. jan. 2012

Møtt: Niels Olaf Eyvindsson, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Herdis Jensen
Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen. Otto West var burturstaddur.

| | |
|---|---|
| Mál 1:<br>Umsókn um stuðul til familjuleguna hjá KFUM-skótunum. | Til 1:<br>Samtykt varð ikki at stuðla tiltakinum. |
| Mál 2:<br>Umsókn um stuðul til ráðstevnu hjá Svimjisambandi Føroya. | Til 2:<br>Samtykt varð at fáa nærri frágreiðing um hetta tiltak áðrenn støða verður tikin. |
| Mál 3:<br>Innkomnar undirskrivtir við ynski um at fáa barnagarð í kommununi. | Til 3:<br>Á fíggjarlógini fyri 2012 eru avsettar kr. 300.000,- til ymiskar forkanningar viðv. møguligari bygging av barnagarði. |
| Mál 4:<br>Skriv viðv. bøgarði í Giljum. | Til 4:<br>Samtykt at fáa staðfest til komandi fund, um tað er kommunan, sum hevur hegnskylduna í slíkum málum og síðani sendir rokning fyri gjørda arbeiðið til eigaran. |
| Mál 5:<br>Umsókn um byggiloyvi til transformarastøð í Sandvík frá SEV. | Til 5:<br>Samtykt varð, at kommunan setir seg í samband við eigararnar um keyp av undir-lendi, áðrenn byggiloyvi verður givið. |
| Mál 6:<br>Umsókn um graviloyvi til kaðal til Sandvíkar frá SEV. | Til 6:<br>Samtykt at fáa meira nágreiniligt at vita, hvussu ætlanin er at grava. |
| Mál 7:<br>Umsókn um byggiloyvi til neyst á matr. nr. 70 í Nesi. | Til 7:<br>Samtykt varð at geva byggiloyvi, treytað av, at eigaraviðuskiftini eru í lagi. |

| | |
|---|---|
| Mál 8:<br>Møguligt samstarv um felags aktingarmann<br>í Suðuroy. | Til 8:<br>Samtykt varð at taka undir við, at arbeitt<br>verður víðari við málinum. |

| | |
|---|---|
| Mál 9:<br>Skriv frá borgara um vegin í Heiðatrøðini. | Til 9:<br>Samtykt varð at boða frá, at kommunan er í<br>ferð við at finna eina loysn viðv. salting og<br>kavarudding av vegunum í sóknini. |
| Mál 10:<br>Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Royn. | Til 10:<br>Samtykt varð at stuðla Bóltfelagnum Royn<br>við kr. 200.000,- eins og undanfarin ár. |
| Mál 11:<br>Breiðkan av Bíarvegi. | Til 11:<br>Garðurin matr. nr. 147f verður fluttur niðan<br>og matr. nr. 206 verður umbýtt við matr. nr.<br>524t, so komast kann víðari. |
| Mál 12:<br>Ikki alment mál | Til 12: |